VB-Neistin 22-25 (8-11):

# Neistin trumfaði í Vági

**Við sigrinum á VB staðfesti Neistin, at skal nakað lið taka Stjørnuna, so skulu tað verða tær bláu**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Bæði fyri og eftir steðgin tóktist VB at hava takið, men í báðum førum settu bláu havnarkvinnurnar trumf á seinastu minuttirnar*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

Enn stendur ikki um lív, tá ovaru liðini í kvinnudeildini spæla. Tað er ein setningur, sum bæði spælarar og viðhaldsfólk kring landið hava sannað. Men fyri tað kunnu dystirnir, sum nú verða spældir, væl brúkast sum ein sera góð ábending um styrkislutfallið millum teirra, sum biðla til FM-heitið í hondbólti.

### Rættin til at bjóða av

Umframt favorittarnar úr Klaksvík, so hava tað serliga verið VB og Neistin, sum hava stríðst um heitið sum næsti biðilin, og tí var dysturin í Vági eisini serliga áhugaverdur. Tey flestu rokna í øllum førum við, at hetta eisini eru liðini, sum skulu hittast í hálvfinalunum, og í so máta var talan um greiða styrkisroynd í Vági. Ein dystur, har VB eisini hevði sítt at hevna, eftir at tær við einum illa mannaðum liði fingu rættiliga bank í Havn fyri nøkrum vikum síðani.

### Orkan restaði

Tað eydnaðist tó ikki VB at seta trumf á dystin. Fyrst og fremst, tí hópurin enn einaferð tóktist vera í smalari lagi.

Største partin av fyrra hálvleiki fylgdust liðini annars væl, og eitt skifti tóktist VB veruliga at skulu leypa avstað. Gestirnir vóru tó skjótar at svara aftur, og seinastu løtuna undan steðginum trýstu tær av álvara. Seinastu fimm minuttirnar vann Neistin við 6-1, soleiðis at tær áttu leiðsluna í steðginum.

Og eftir steðgin var gongdin hin sama. VB stríddi seg aftur í dystin, og 13 minuttir fyri leiklok høvdu tær aftur rætta takið. Støðan var tá 21-18 til heimaliðið, men so hendi akkurát tað, sum var hent fyri steðgin. VB megnaði ikki at halda ferðini koyrandi. Neistin fekk samstundis verjuna upp í hægsta gear, og saman við frálíkum málmansspæli fullkomuliga punkteraði hetta hetta heimaliðið.

Hóast tær bláu hesa løtuna brendu tvey brotskøst, so megnaðu tær at kora sjey ferðir á rað, áðrenn VB at enda fekk pyntað um úrslitið. Og so var fagnaðurin stórur, tá seinasta bríkslið hevði ljóðað.

### StjørnanX2

Fyrst og fremst, so fingu tær bláu við hesum prógvað, at tær í løtuni eiga at roknast sum fremsti sambiðilin hjá Stjørnuni. Og sum tikið varð til í Útvarpinum, so staðfestu tær eisini, at steypafinalan komandi leygardag er millum tey bæði sterkastu liðini í landinum.

So er spurningurin, hvørt Neistin veruliga megnar at bjóða Stjørnuni av. Tað fáa tær í øllum førum møguleikan til tvær ferðir á rað komandi tvey vikuskiftini. Fyrst í steypafinaluni, og síðani tá tær í landskappingini skulu spæla í Klaksvík.

Hjá VB ræður nú fyrst og fremst um at halda høvdinum høgt komandi vikurnar. Útskiftingin á liðnum hevur verið stór seinasta árið, og tí er ein sessur í oddinum ikki heilt so sjálvsagdur, sum hann hevur verið. Greiðar ábendingar hava tó verið, og eitt nú vísti sigurin í Klaksvík, at tær kunnu sveiggja seg heilt upp. Men tað krevur meira støðugt spøl í 60 minuttir, enn tær sýndu í Vági sunnudagin.

StÍF-VÍF 26-16 (14-8):

# VÍF byrjar av nýggjum



*Tað var eitt at kalla spildurnýtt VÍF-lið, sum fór á vøllin sunnudagin. Og so gjørdist uppgávan nakað møtumikil móti væl meira roynda heimaliðnum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**StÍF staðfesti sunnudagin, at tær aftur verða partur av Sunset-kappingini komandi kappingarár. Eitt nýtt VÍF lið tykist samstundis ásanna, at tær byrja mest sum av nýggjum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Kvinnuloiðið hjá VÍF má sigast at hava sett punktum fyri sínum kanska besta tíðarskeiðið í fremstu røð í føroyskum kvinnuhondbólti.

Sunnudagin spældu tær ein sera týðandi dyst á Skála, har StÍF við einum sigri kundi staðfesta sína framhaldandi tilveru í Sunset-kappingini.

Tað gjørdu strandakvinnurnar eisini við tryggum sigri, og tí er einki at siga til, um lagið var gott á heimaliðnum eftir dystin.

Hjá VÍF sær nú kanska svartari út í so máta. Skulu tær halda sessinum í deildini, so krevur tað tveir sigrar í teimum báðum seinastu dystunum, samstundis sum Søljan bert kann fáa tvey stig í trimum dystum. Og tað kann gerast ein sera møtumikil uppgáva - hóast hon ikki er ógjørlig at loysa.

Tað stendur tó greitt, at VÍF nú fyrst og fremst satsar upp á at byggja sær eitt nýtt lið upp frá grunini. Miðalaldurin á teimum, sum byrjaðu dystin á Skála mikudagin mundi liggja niðanfyri tey 20, og í so máta er talan heilt greitt um eitt tilvitað skifti í spælarahópinum. Eitt skifti, sum væl kann kosta sessin í fremstu røð í eina tíð. Men samstundis eitt skifti, sum væl kann vera tvingandi neyðugt, nú royndu kreftirnar spakuliga eru farnar at eldast. Meira royndir fáa nýggju spælararnir bert við at spæla fleiri dystir, og so er í fyrstu atløgu kanska ikki so øgiliga avgerandi, hvørt hesir verða spældir móti sterkastu ella næst sterkastu liðunum í landinum.

## FAKTA UM DYSTIN

**StÍF-VÍF 26-16 (14-8)**

**Málskjútttar**

**StÍF:** Poula D. Olsen 9, Paula B. Høgnesen 7(5), Rebekka Justinussen 5, Malan Petersen 3, Ninna K. Johansen 2

**VÍF:** Torgunn Johannesen 4, Fríða Marjunardóttir 3, Jacklin Durhuus 3, Finngerð Jensen 2, Heidi Joensen 1, Linda Johannesen 1, Bjørg Patursson 1, Annfríða Lamhauge 1

**Brotskøst:** StÍF 5, VÍF 1

**Útvísingar:** StÍF 2, VÍF 2

**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen

# Galla hjá Ljósinum

FIMLEIKAGALLA
*tíðindaskriv*
*post@sosialurin.fo*

Komandi vikuskifti fer Fimleikafelagið Ljósið at hava gallasýningar í Norðurlandahúsinum.

Felagið hevur 30 ára stovningarár í ár, og eru sýningarnar ein liður í hesum hátíðarhaldi. Farna heyst var stórt familjutiltak við felagsfimleiki, hoppiborgum og risalagkaku í Badmintonhøllini, og nú eru so fýra gallasýningar á skránni.

### Fimleikur í miðdeplinum

Felagsevnið á framsýningunum er fimleikur, men tað verða rørslur og brøgd í alskyns útgávum. Sýningin er sett saman av mongum innsløgum, har nøkur bera brá av dansi, showi, meðan onnur dramatisera ævintýr, úttrykkja eitt ella annað og sumt mest av øllum er skemt og undirhald.

Allur fimleikur felagsins er umboðaður, og sæst tað aftur við eitt nú blandaðum liðum á gólvinum umframt stórum aldursmuni, 6-70 ár.

### Vóna at síggja nógv fólk

Tey, ið skipa fyri, hava veruliga spílað seg út, havt eykavenjingar í vikuskiftunum, seymað búnar, fingið útgerð til vega og manererað við ymiskt annað í vónini um, at alt skal blíva gott, tá avtornar. Vónin er so at síggja nógv fólk í Norðurlandahúsinum í vikuskiftinum, har framsýningarnar vera báðar dagarnar kl. 16.00 og 19.00.



*Talan verður um fimleik í breiðum týdningi, nú Ljósið markerar 30 ára dagin við gallasýningum í Norðurlandahúsinum*